# OLE2 farin av bakkastokki

Verkætlanin Okkara Lív sum Eldri - OLE2 – er farin av bakkastokki. OLE2 er ein millumtjóða verkætlan, sum Nærverkið og Føroya Kommunufelag, saman við kommunum í útjaðaraøkjunum í Norðureuropa, fara í samstarv um at finna loysnir, sum skulu betra umstøðurnar hjá eldri borgaranum í framtíðini.

Verkætlanin er framhald av millumtjóða verkætlanini um *Okkara Lív sum Eldri*, sum Føroya Kommunufelag saman við m.a. Nærverkinum luttók í, og sum endaði í 2006. Í OLE2 verða tilmælini, sum verkætlanin kom fram til, aftaná at hava kannað áskoðanir hjá framtíðar eldri borgarum, settar í verk.

Kanningin vísti millum annað, at komandi eldri borgarar í øllum luttakandi londunum ynskja at búgva í egnum heimi longst møguligt. Í tilmælunum verður víst á tiltøk, sum kunnu stuðla hesum ynski og vera við til, at eldri borgarin hevur ein innihaldsríkan gerandisdag í felagsskapi.

Verkætlanin OLE2 er í fýra pørtum, har Nærverkið luttekur í partinum um *Starvsfólkamenning og starvsfólkatilgongd*, meðan Føroya Kommunufelag luttekur í partinum um *Netverk*. Møguleiki er so eisini til at fylgja við í hinum báðum pørtunum, sum handla um *Bústaðarmøguleika*r og *Heilsutænastur*, har millum annað verður hugt at hvussu trygdin viðvíkjandi heiluvági kann gerast betur. Til hetta arbeiði verður samstarvað við Landsapotekaran.

Fyrsti fundurin í OLE2 var hildin í Luleå í Svøríki í okt. í ár, har fundast var um ymiskt viðvíkjandi arbeiðinum í verkætlanini, og um reglur og krøv, sum stuðulsveitararnir hava til luttakandi londini.

## Nærverkið

Nærverkið luttekur í verkætlanini í partinum *Starvsfólkamenning og starvsfólkatilgongd*, har endamálið er at fáa hugskot og at læra av verkætlanum hjá øðrum luttakandi londum. Karmur um verkætlanina hjá Nærverkinum verður Røktarheimið á Mørkini, har Eden hugsjónin verður innkoyrd.

Framskrivingar av alddurs- og kynsbýtinum í Føroyum vísa, at tað verða alt færri fólk í arbeiðsførum aldri, meðan talið av gomlum veksur. Hetta er ein av framtíðar avbjóðingunum

Innovatively investing in Europe's Northern Periphery for a sustainable and prosperous future

European Union
European Regional Development Fund

á eldraøkinum - serstakliga tí talið av kvinnum minkar mest, og tað eru flest kvinnur, ið arbeiða innan hetta økið.

Nærverkið hevur tí valt at fara inn í verætlanina *Starvsfólkamenning og –tilgongd*, har arbeitt verður við:

- Hvussu fáa vit fleiri starvsfólk?
- Hvat skal til fyri, at tað verður enn meira áhugavert at arbeiða á eldraøkinum?
- Hvussu varðveita vit tey útbúðnu starvsfólkini á økinum?

Neyðugt verður, at starvsfólkasamansetingin verður broytt, har aðrir og nýggir starvfólkabólkar koma inn á eldraøkið at arbeiða. Fyribyrgjan, heilsufremjan og mentan verður ein størri partur av gerandisdegnum.

Arbeitt verður eisini við at styrkja leiklutin hjá teimum avvarðandi og sjálvboðnum áhugabólkum.

Við at arbeiða út frá Eden hugsjónini, fáa bæði starvsfólk og búfólk størri avgerðarrætt í gerandisdegnum. Hetta krevur menning av starvsfólkunum, samstundis sum tað gevur størri nøgdsemi og er viðvirkandi til trivnaðin bæði fyri búfólk og starvsfólk. Kanningar vísa at heim, ið arbeiða eftir Eden hugsjónini, hava størri starvsfólkatilgongd.



Sonja Klein økisleiðari hjá Nærverki fær prát við finsku samstarvsfelagar Føroya Kommunufelags

## Føroya Kommunufelag

Í verkætlanini Netverk eru tað limir í Føroya Kommunufelag sum luttaka. Hetta verður gjørt við tiltøkum í kommunum, sum í framtíðini vilja skapa umstøður hjá eldri borgarum at skipa sín dag við felags aktivitetum, bæði við at møtast andlit til andlit og á internetinum.

Tað “gráa gullið” skal eisini aktiverast, tí óroyndir møguleikar liggja í vitanini, sum eldri borgarar liggja inni við, aftaná eitt langt lív.

Í *Netverk* verður eisini arbeitt við at fáa gjørt eina heimasíðu, har eldri borgarar kunnu heinta upplýsingar av ymsum slag, leita eftir øðrum við somu áhugamálum og annars samskifta um dagin og vegin.

Endamálið við *Netverk* er sum navnið sigir, at lætta um møguleikan hjá eldri borgarum til at vera saman við øðrum um felags áhugamál. Í ljósinum av at familjumynstrið broytist, og tað ikki longur eru stórar familur, sum vara av hvørjum øðrum í sama mun sum hevur verið, er tað alneyðugt at taka hædd fyri einsemi hjá eldri borgaranum.

Limirnir í Føroya Kommunufelag fara at arbeiða saman við Oulu kommunu í Finnlandi og Luleå í Svøríki í *Netverk*. Talan er her um tvær stórar kommunur, sum hava royndir á økinum, og leita nú eftir nýggjum loysnum.

Nærverkið og Føroya Kommunufelag ætla eisini at samstarva tvørs av verkætlanunum viðvíkjandi felags tiltøkum fyri eldri borgarum, sum búgva í egnum heimi.

Í verkætlanini luttaka umframt Føroyar eisini kommunurnar Luleå í Svøríki og Bodø í Norra. Nýggir luttakarir eru komnir við frá Finnlandi og Íslandi. Verkætlanin strekkir yvir 3 ár og hevur eina fíggjarætlan uppá tilsamans knappa 15 mil. Kr.. Evropasamveldið, ígjøgnum Northern Periphery Programme,  stuðlar við umleið helvtini av upphæddini. Føroyski parturin er umleið 1,3 mil. kr.

**Fakta**

Millumtjóða verkætlanin OLE2 gongur yvir 3 ár, frá 2008 til 20011,  og verður leidd av Luleå kommunu.

Luttakarar:
Føroyar:  Nærverkið og Føroya Kommunufelag
Svøríki:  Luleå kommuna, uml. 74.000 íb.
Norra: Bodø kommuna,  uml. 43.000 íb.
Finnland: Oulu City,  uml. 115.000 íb.
Hornafjarðar kommuna,  uml. 2.100 íb.
Akureyrarbær,  uml. 17.000 íb.
Hafnafjarðarkaupstaður,  uml. 25.000 íb.
Eisini er ætlað, at Skotland luttekur frá 2009.

Í OLE2 eru hesar partsætlanir:
Starvsfólkamenning og starvsfólkatilgongd: Bodø (leiðari), Luleå, Nærverk, Oulu, Hafnafjarðar, Hornafjarðar og Akureyrar kommunur.
Heilsutænastur: Luleå (leiðari), Bodø og Føroyar.
Netverk: Føroya Kommunufelag (leiðari), Luleå og Oulu.
Bústaðarmøguleikar:  Luleå (leiðari) og Bodø.

Heimasíður:
Verkætlanin OLE II: www.ourfuture.eu
NPP: www.northernperiphery.net
Føroya Kommunufelag: www.fkf.fo
Nærverk: www.naerverk.fo
Luleå: www.lulea.se
Bodø: www.bodo.kommune.no
Oulu City: www.oulu.fi
Hafnafjørður: www.hafnarfjordur.is
Akureyri: www.akureyri.is
Hornafjørður:  www.hornafjordur.is

Northern Periphery Programme 2007–2013
Innovatively investing in Europe's Northern Periphery for a sustainable and prosperous future
European Union
European Regional Development Fund